MARKAMÓTSNEVNDIN

Tórshavn 5. november 2018

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Mál um gjaldsskyldu fyri røktarheimspláss hjá borgara yvir 67 ár

Almannaverkið hevur við skrivi dagfest 9. mars 2018 lagt mál fyri Markamótsnevndina viðvíkjandi markamótinum millum § 13 í Løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m og § 32 í forsorgarlógini.

Seinni hevur Almannaverkið í telduposti, dagfest 29. mai 2018, orðað eitt ynski um, at Markamótsnevndin tekur støðu til prinsipiella spurningin, har støðan broytist frá tørvi á námsfrøðiligum stuðli til tørv á røkt.

Markamótsnevndin tekur kortini ikki støðu til prinsipiel mál, einans ítøkilig mál.

Sambært upplýsingunum hjá Almannaverkinum er talan um borgara yvir 67 ár, sum hevur búð á stovni hjá Almannaverkinum síðan 1984.

Avvarðandi hava vent sær til Kommununa fyri at fáa pláss til borgarin á ellis- og røktarheimi í Kommununi, og Kommunan hevur svarað, at Almannaverkið hevur havt og hevur framhaldandi ábyrgd av at veita honum bústað við tí, sum hartil hoyrir.

Sum skilst hevur borgarin fingið bústað á ellis- og røktarheimi í Kommununi. Spurningurin er nú, um Almannaverkið ella Kommunan eiga at rinda fyri hansara uppihald á ellis- og røktarheiminum.

Sambært familjuni var borgarin blivin sjúkur sum smábarn og broyttist soleiðis, at hann kláraði seg ikki sjálvan og fekk trupulleikar við at tosa. Hetta er orsøkin til, at hann hevur havt tørv á bústaði á sambýli. Borgarin er annars friðarligur og ger ikki nógv um seg.

Sambært visatiónsskjali frá Kommununi fra desember 2017 hevur borgarin tørv á ávísari hjálp, men er annars ikki illa fyri. Starvsfólk smyrja breyð, og tey gera eisini te og kaffi klárt. Hann fær sær kortini at eta og drekka av tí, sum er sett klárt ár borðið. Borgarin gongur toluliga væl, tó hava starvsfólk valt at givið honum rollator. Hann megnar sjálvur at lata seg í. Starvsfólk leggja evt. rein klæði fram og hjálpa honum við hosunum. Hann fer sjálvur á WC. Hann megnar ikki persónligt reinføri væl sjálvur, og starvsfólk mugu tískil at hjálpa honum við at fara í bað.

Í mun til sosiala samveru og netverk verður upplýst, at hann hevur gott samband við familjuna. Aldurin ger, at hann hevur ikki somu orku og megnar ikki á sama hátt, at búgva saman við yngri fólkum á sambýlinum. Hann hevur tí lyndi til at trekkja seg frá tí sosiala lívinum har. Borgarin er friðarligur og róligur, minnið er gott og hann tykist verða sálarliga væl fyri.

MARKAMÓTSNEVNDIN

Sambært Markamótsskjalinum undir markamóti 3 er uppgávan hjá landinum í mun til búpláss ásett í § 32 í forsorgarlógini. Hetta fevnir um ”búpláss til persónar við týðandi likamligum ella sálarligum breki… sum hava tørv á hjálp og stuðli til vanligt virksemi, umframt møguliga røkt.”

Eftir ítøkiligu upplýsingunum, sum fyriliggja, metir Markamótsnevndin ikki, at borgarin hevur týðandi likamligt ella sálarligt brek.

Í mun til ítøkiliga málið metir Markamótsnevndin, at borgarin er ábyrgd hjá Kommununi sambært løgtingslóg nr. 19 frá 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., ið sambært § 14 eigur at veita bústað til fólkapensjónistar við ellisbreki ella varandi sjúku, og sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið.

Bárður Larsen, formaður

Ása Olsen

Katrin Danielsen